# Fólkanøvn í Vága sýslu 1801

*Eftir Jákup í Jákupsstovu*

Henda triðja grein um fólkanøvn í Føroyum 1801 viðger fólkanøvnini í Vága sýslu. Hinar báðar fyrru greinirnar stóðu í 14. og 15. bók av Fróðskaparriti og viðgjørdu fólkanøvnini í Suðuroyar sýslu og í Sandoyar sýslu.

Í Vágum búðu í 1801 407 fólk, og í Mykinesi búðu 75. Hetta eru tilsamans 482 fólk ella 9 % av Føroya fólki, sum í 1801 taldi 5.265.

Heimildir og viðgerðarháttur eru her tey somu sum í hinum fyrru greinunum, og byrjað verður við bygda-yvirlitinum, so sum tað er tilskilað í manntalslistanum frá 1801:

| | |
|---|---|
| Midvaag ......................... | 145 |
| Sandevaag ...................... | 110 |
| Sørvaag ......................... | 86 |
| Bøe .............................. | 66 |
| | 407 |
| Myggenæs ....................... | 75 |
| Tilsammen i Waagøe Sogn ............ | 482 Personer |

### *Miðvágur*

Tilsamans 36 húski, 145 fólk.

*Kvinnur:*

2 Agatha
1 Agnes
1 Aleth
13 Anna
2 Anna Cathrine
3 Anna Elisabeth
1 Anna Lisbeth
2 Anna Magreta
1 Anna Sophia
1 Barbara
3 Cathrine
1 Dorthea Kristine
1 Elisabeth
5 Elsebeth
3 Elsebeth Malene
1 Friderica
1 Friderica Anna Sophia
1 Friderica Sophia
1 Jette Sophia
1 Karen
3 Lisbeth
5 Malene
2 Maren
1 Maren Catrine
1 Maren Sophia
1 Mariane
2 Marie
1 Maria Susanna
1 Rachel Marie
1 Sigga
2 Sigga Cathrine
1 Sigga Malene
1 Sigri
1 Sophia
5 Sundeva
5 Susanna

78 kvinnur í Miðvági 1801

*Menn:*

2 Daniel
1 Ellev
8 Hans
1 Hans Christopher
1 Hans Samuel
2 Harald
1 Heine
9 Jacob
1 Jesser
9 Johan
5 Johannes
3 John
1 Jon
1 Michel
5 Niclas
6 Ole
1 Peder
2 Rasmus
1 Robert
2 Samuel
2 Simon
3 Thomas

67 menn í Miðvági 1801

## *Sandavágur*

Tilsamans 23 húski, 110 fólk.

*Kvinnur:*

9 Anna
2 Anna Lisbeth
2 Anna Magreta
1 Annika
1 Barbara
1 Birthe
1 Birthe Cathrine
2 Cathrine
1 Dorthea
1 Ellen Dorthea
4 Elsebeth
1 Elsebeth Susanne
1 Friderica Cathrine
1 Inger Magrete
1 Lena
1 Lisbeth
4 Malene
1 Malene Catrine
7 Maren
1 Maren Andrea
1 Maren Elisabeth
1 Maren Susanna
1 Mariane
1 Marie
1 Marthe Susanna
2 Rachel
1 Sara Sophia
1 Sigga
3 Sundeva
1 Susanna
1 Susanna Cathrine

57 kvinnur í Sandavági 1801

*Menn:*

1 Andreas
1 Berent
1 Claus Peter
1 Daniel
1 Eiden
1 Gutte
3 Hans
1 Hans Peder
1 Harald
1 Harald Jacob
3 Heine
1 Hendrich
4 Jacob
1 Jacob Peder
1 Jens Pauli
7 Johan
1 Johan Michael
3 Johannes
3 John
1 Michel
1 Niclas
1 Nils
3 Ole
1 Ole Jacob
2 Peder Christian
3 Poul
1 Simon
1 Thomas
2 Zacharias
1 Østen

53 menn í Sandavági 1801

## *Seyrvágur*

Tilsamans 19 húski, 86 fólk.

| *Kvinnur:* | *Menn:* |
|---|---|
| 5 Anna | 1 Andreas |
| 6 Cathrine | 1 Antonius |
| 5 Elsebeth | 2 Daniel |
| 1 Eva Magrete | 1 Egvan |
| 1 Friderica | 4 Hans |
| 1 Kristine Cathrine | 4 Heine |
| 1 Lisbeth | 1 Isak |
| 4 Malene | 5 Jacob |
| 4 Maren | 1 Jens |
| 1 Marine | 1 Jesser |
| 1 Ragnil | 3 Johannes |
| 1 Sara | 8 John |
| 1 Sara Sophia | 2 Niclas |
| 3 Sigga | 1 Nicolaj |
| 3 Sundeva | 6 Ole |
| 3 Susanna | 1 Poul |
| | 3 Rasmus |
| 41 kvinnur í Seyrvági 1801 | 45 menn í Seyrvági 1801 |

## *Bøur og Gásadalur*

13 húski, 66 fólk.

*Kvinnur:*

3 Agatha
5 Anna
1 Anna Catrine
2 Cathrine
1 Cathrine Marie
3 Elsebeth
1 Elsebeth Johanne
1 Henrica Christiana
2 Malene
3 Maren
2 Mari
1 Sara Sophia
1 Sophia Magdalena
1 Sundeva
2 Susanna

29 kvinnur í Bíggjar sókn 1801

*Menn:*

1 Abraham
2 Daniel
1 Gregorius
1 Gutte
2 Hans
1 Hans Pauli
1 Heine
7 Jacob
5 Johan
1 Johannes
4 John
1 Michel
3 Ole
2 Peder
1 Poul
3 Rasmus
1 Zacharias

37 menn í Bíggjar sókn 1801

## *Mykines*

Tilsamans 17 húski, 75 fólk.

*Kvinnur:*

1 Agnes
11 Anna
1 Anna Cathrine
1 Bella
4 Cathrine
1 Ellen Maria
4 Elsebeth
1 Elsebeth Sophia
1 Juliane
1 Karen
2 Lisbeth
1 Malene
1 Maren
1 Mariane
3 Marie
1 Marie Cathrine
1 Rachel
1 Sigga
4 Sundeva

41 kvinnur í Mykinesi 1801

*Menn:*

2 Daniel
1 Erik
2 Hans
1 Harald
2 Isak
6 Jacob
1 Jens
2 Jesser
7 Johan
6 Johannes
2 Ole
1 Rasmus
1 Sivert

34 menn í Mykinesi 1801

## *Kvinnunøvn í Vága sýslu 1801*

5 *Agatha* eru tríggjar í Bíggjar sókn, 31—41 ár. Ein A. í Miðvági er somuleiðis 31 ár, og har er eisini eitt 10 ára »opfostringsbarn«.

2 *Agnes* eru 75 ára einkja í Miðvági og 16 ára genta í Mykinesi.

1 *Aleth* Svaboe er 15 ára dóttir prestaeinkjunnar í Kálvalíð í Miðvági.

*Andrea* finst bara í samanseting Maren A.

43 *Anna* eru í øllum bygdum, og A. er vanligasta kvinnunavn í Vágum 1801. Umframt tær 43, ið hava A. sum einasta fornavn, eru 15, ið hava A. sum fremra navn av tveimum, og einasta kvinna, sum ber trý fornøvn, hevur A. teirra millum.

4 *Anna Cathrine* eru ein 18 ára arbeiðskona í Bø, tvær 4 ára gentur í Miðvági, og ein 3 ára genta í Mykinesi.

3 *Anna Elisabeth* eru allar í Miðvági, 59, 47 og 3 ár. Sí eisini A. Lisbeth.

3 *Anna Lisbeth* eru tvær í Sandavági, 36 og 17 ár, og ein 4 ára genta í Miðvági. Sí eisini A. Elisabeth.

4 *Anna Magreta* eru 24 ára løgmanskona á Steig í Sandavági, 15 ára arbeiðskona í Miðvági, og tvær smágentur, 6 og 1 ár, ávikavist í Sandavági og í Miðvági.

1 *Anna Sophia* er ein 8 ára genta í Miðvági.

1 *Annika* er 2 ára sýslumansdóttir í Sandavági.

2 *Barbara* eru 33 ára bóndakona í Miðvági og ein 20 ára bóndadóttir í Sandavági.

1 *Bella* er 81 ára bóndakona í Mykinesi.

1 *Birthe,* 18 ár, tænir á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági.

1 *Birthe Cathrine* er 37 ára sýslumanskona í Sandavági.

17 *Cathrine* eru í øllum sóknum. Har aftrat er C. seinna navn í samansetingum: Anna C., Birthe C., Friderica C., Kristine C., Malene C., Maren C., Maria C., Sigga C., Susanna C., og fyrra navn í samanseting: C. Marie.

1 *Cathrine Marie* er 31 ára bóndakona í Bø.
*Christiana* finst bara í samanseting Henrica C.
1 *Dorthea* er 56 ára matmóðir í Sandavági. Sí eisini D. Kristine og Ellen D.
1 *Dorthea Kristine* er 7 ára bóndadóttir í Miðvági.
1 *Elisabeth* er 14 ára genta í Miðvági. Sí eisini Anna E. og Maren E.
*Ellen* finst bara sum fremra navn í samansetingum.
1 *Ellen Dorthea* er ársgomul genta í Sandavági.
1 *Ellen Maria* er 41 ára matmóðir í Mykinesi.
21 *Elsebeth* eru í øllum sóknum, og har aftrat eru 6, ið hava E. sum fremra navn av tveimum.
1 *Elsebeth Johanne* er 15 ára bóndadóttir í Bø.
3 *Elsebeth Malene* eru allar í Miðvági og allar yngri enn 12 ár.
1 *Elsebeth Sophia* er 7 ára genta í Mykinesi.
1 *Elsebeth Susanne* er 31 ára bóndadóttir í Sandavági.
*Eva* finst bara í samanseting Eva Magrete.
1 *Eva Magrete* er 68 ára bóndakona í Seyrvági.
2 *Friderica* eru ein ársgomul bóndadóttir í Seyrvági og ein 5 ára bóndadóttir í Miðvági. Har aftrat eru tríggjar, ið hava F. sum fremra navn av tveimum ella sum fremsta navn av trimum fornøvnum.
1 *Friderica Anna Sophia* Verdich, 21 ára húshaldskona í prestagarðinum Jansagerði í Miðvági, er einasta kvinna í Vágum við trimum fornøvnum í 1801.
1 *Friderica Cathrine* er 11 ára sýslumansdóttir í Sandavági.
1 *Friderica Sophia* er 3 ára bóndadóttir í Miðvági.
1 *Henrica Christiana* er 18 ára kona í Bø.
*Inger* finst bara í samanseting I. Magrete.
1 *Inger Magrete* Lund er 4 ára løgmansdóttir á Steig í Sandavági.
*Jette* finst bara í samanseting J. Sophia.
1 *Jette Sophia* Svaboe er 23 ára gift dóttir prestaeinkjunnar í Kálvalíð í Miðvági.
*Johanne* finst bara í samanseting Elsebeth J.

1 *Juliane* er 5 ára bóndadóttir í Mykinesi.
2 *Karen* eru 68 ára bóndakona í Miðvági og 77 ára einkja í Mykinesi.
*Kristine* finst bara í samansetingum K. Cathrine og Dorthe K.
1 *Kristine Cathrine* Svaboe er 26 ára kona í Seyrvági.
1 *Lena*, 18 ár, tænir á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági.
7 *Lisbeth* eru tríggjar í Miðvági, 55, 50 og 7 ár; 35 ára gomul genta í Sandavági, 32 ára bóndakona í Seyrvági og tvær 18 ára gentur í Mykinesi.
*Magdalena* finst bara í samanseting Sophia M.
*Magreta* finst bara sum seinna navn í samansetingum Anna M., Eva M. og Inger M.
16 *Malene* eru í øllum bygdum og í øllum aldri. Sí eisini Elsebeth M., Sigga M. og M. Catrine.
1 *Malene Catrine* er ársgomul bóndadóttir í Sandavági.
17 *Maren* eru í øllum bygdum og í øllum aldri, og har aftrat eru 5, ið hava M. sum fyrra navn av tveimum.
1 *Maren Andrea* Lund er 6 ára løgmansdóttir á Steig í Sandavági.
1 *Maren Catrine* er 6 ára genta í Miðvági.
1 *Maren Elisabeth* er 11 ára genta í Sandavági.
1 *Maren Sophia* er ársgomul bóndadóttir í Miðvági.
1 *Maren Susanna* er 2 ára genta í Sandavági.
2 *Mari* eru báðar í Bíggjar sókn, 67 og 57 ár.
3 *Mariane* eru 40 ára bóndakona í Sandavági, 35 ára bóndakona í Mykinesi, og 5 ára bóndadóttir í Miðvági.
6 *Marie* eru tríggjar konur í Mykinesi, 63, 44 og 25 ár. Hinar tríggjar eru allar í tjúgunum, tvær í Miðvági og ein í Sandavági. Aftrat hesum eru tvær, ið hava M. sum fyrra navn av tveimum, og tríggjar, ið hava M. sum seinna av tveimum fornøvnum.
1 *Marie Cathrine* er 27 ára kona í Mykinesi.
1 *Maria Susanna* Svaboe er 50 ára presta-einkjan í Kálvalíð í Miðvági.

1 *Marine* er 61 ára bóndakona í Seyrvági.
*Marthe* finst bara í samanseting M. Susanne.
1 *Marthe Susanna* Lund er 2 ára løgmansdóttir á Steig í Sandavági.
3 *Rachel* eru 36 ára kona og 17 ára bóndadóttir í Sandavági, og ein 6 ára bóndadóttir í Mykinesi.
1 *Rachel Marie* Svaboe er 29 ára ógift dóttir prestaeinkjunnar í Kálvalíð í Miðvági.
1 *Ragnil* er 37 ára kona í Seyrvági.
1 *Sara* er 15 ára »Tjenestepige« í Seyrvági.
3 *Sara Sophia* eru 27 ára bóndakona í Seyrvági, 13 ára arbeiðskona á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági og ein 12 ára bóndadóttir í Gásadali.
6 *Sigga* eru tríggjar í Seyrvági, 70, 68 og 7 ár. Henda yngsta er ommudóttir aðra Siggu, men tær tríggjar í Miðvági, Sandavági og í Mykinesi eru allar einnevndar hvør í síni bygd, og allar eru tær um fjøruti/hálvthundrað ár.
2 *Sigga Cathrine* eru tvær smágentur í Miðvági, 4 og 1 ár.
1 *Sigga Malene* er 18 ára genta í Miðvági.
1 *Sigri* er 64 ára bóndakona í Miðvági.
1 *Sophia* er 20 ára kona í Miðvági, og har aftrat eru 8, ið hava S. sum seinna navn av tveimum, ein hevur S. sum síðsta navn av trimum fornøvnum, og ein hevur S. sum fyrra navn av tveimum.
1 *Sophia Magdalena* er ársgomul bóndadóttir í Bø.
16 *Sundeva* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.
11 *Susanna* eru í øllum bygdum í Vágum, men ikki í Mykinesi. Sí eisini Elsebeth S., Maren S., Maria S., Marthe S. og S. Cathrine.
1 *Susanna Cathrine* er 8 ára genta í Sandavági.
246 kvinnur í Vága sýslu 1801.

*Mannanøvn í Vága sýslu 1801*

1 *Abraham* er 46 ára kongsbóndi í Gásadali.

2 *Andreas* eru 71 ára einkjumaður í Sandavági og ein 50 ára óðalsbóndi í Seyrvági.

1 *Antonius* er 82 ára maður í Seyrvági.

1 *Berent* er 20 ára húskallur á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági.

*Christian* finst bara í samanseting Peder C.

*Christopher* finst bara í samanseting Hans C.

1 *Claus Peter* Lund er 7 ára løgmanssonur á Steig í Sandavági.

9 *Daniel* eru í øllum bygdum, aldur 7—76 ár.

1 *Egvan* er 59 ára óðalsbóndi í Seyrvági.

1 *Eiden* er 19 ára húskallur í Sandavági.

1 *Ellev* Haaber er 34 ára ógiftur sóknarprestur í Miðvági.

1 *Erik* er 49 ára giftur maður í Mykinesi.

1 *Gregorius* er 66 ára óðalsbóndi í Gásadali.

2 *Gutte* eru 67 ára húsbóndi í Sandavági og ein 60 ára kongsbóndi í Bø.

19 *Hans* eru í øllum bygdum og í øllum aldri. Har aftrat eru 4, ið hava H. sum fyrra navn av tveimum.

1 *Hans Christopher* er 35 ára kongsbóndi í Miðvági.

1 *Hans Pauli* er 11 ára bóndasonur í Gásadali.

1 *Hans Peder* er 2 ára bóndasonur í Sandavági.

1 *Hans Samuel* Svaboe er 31 ára sonur prestaeinkjunnar í Kálvalíð í Miðvági.

4 *Harald* eru tveir óðalsbøndur í Miðvági, 58 og 52 ár, ein 82 ára óðalsbóndi í Sandavági og ein 3 ára bóndasonur í Mykinesi. Sí eisini H. Jacob.

1 *Harald Jacob* er 8 ára abbasonur Haralds bónda í Sandavági.

9 *Heine* eru í øllum sóknum í Vágum, men ikki í Mykinesi. Aldur 11—63 ár.

1 *Hendrich*, 16 ár, »opfostres i Huset« hjá Johan bónda í Sandavági.

3 *Isak* eru ein 55 ára óðalsbóndi í Seyrvági, ein 62 ára kongsbóndi og ein 9 ára bóndasonur í Mykinesi.

31 *Jacob* eru í øllum bygdum, og J. er vanligasta mansnavn í Vágum 1801. Aftrat teimum 31, ið hava J. sum einasta fornavn, eru 2, ið hava J. sum seinna navn av tveimum, og ein, ið hevur J. sum hitt fyrra av tveimum fornøvnum.

1 *Jacob Peder* er 30 ára jarðarbrúkari í Sandavági. Faðirin er Peder Christian Jacobsen, so kanska hoyrir Peder upp í eftirnavnið. Sí Christiansen.

2 *Jens* eru 59 ára húskallur í Seyrvági og ein 47 ára kongsbóndi í Mykinesi.

1 *Jens Pauli* er 19 ára bóndasonur í Sandavági.

4 *Jesser* eru 65 ára óðalsbóndi og ársgamal abbasonur hansara í Mykinesi, 70 ára óðalsbóndi í Seyrvági og ein 23 ára bóndasonur í Miðvági.

28 *Johan* eru í øllum bygdum uttan í Seyrvági; men í framburði man lítil ella eingin munur hava verið á Johan og John, og tilsamans eru tey nøvnini enntá meiri útbreidd enn Jacob.

1 *Johan Michael* Lund er 48 ára løgmaður á Steig í Sandavági.

18 *Johannes* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.

18 *John* eru í øllum bygdum í Vágum, men ikki í Mykinesi. Sí eisini Johan.

1 *Jon* er 64 ára óðalsbóndi í Miðvági.

3 *Michel* eru 59 ára óðalsbóndi í Sandavági, 10 ára bóndasonur í Gásadali og ein 3 ára smádrongur í Miðvági. Sí eisini Johan M.

8 *Niclas* eru allastaðni í Vágum uttan í Bíggjar sókn, men ikki í Mykinesi.

1 *Nicolai* er 16 ára drongur í Seyrvági.

1 *Nils* er 34 ára húskallur í Sandavági.

20 *Ole* eru í øllum bygdum og í øllum aldri. Sí eisini O. Jacob.

1 *Ole Jacob* er ársgamal drongur í Sandavági.

*Pauli* finst bara í samansetingum Hans P. og Jens P.

3 *Peder* eru feðgar í Gásadali, 65 og 29 ár, og ein 29 ára húskallur í Jansagerði í Miðvági. Sí eisini Claus P., Hans P., Jacob P. og P. Christian.

2 *Peder Christian* eru 59 ára abbi og 6 ára abbasonur í Sandavági.

5 *Poul* eru tríggir í Sandavági, 77, 27 og 16 ár; og tveir 14 og 18 ára bóndasynir ávikavist í Seyrvági og í Gásadali.

9 *Rasmus* eru í øllum bygdum uttan í Sandavági. Aldur: 9—86 ár.

1 *Robert* er 42 ára óðalsbóndi í Miðvági.

2 *Samuel*, 27 og 2 ár, eru báðir í Miðvági. Sí eisini Hans S., sum er faðir yngsta S.

3 *Simon* eru 56 ára jarðyrkismaður og 2 ára bóndasonur í Miðvági, og ein 35 ára bóndasonur í Sandavági.

1 *Sivert* er 57 ára húsbóndi í Mykinesi.

4 *Thomas* eru allir millum 23 og 39 ár. Tríggir í Miðvági og ein í Sandavági.

3 *Zacharias*. Elstur er 54 ára óðalsbóndi í Gásadali. Hinir eru í Sandavági: 47 ára sýslumaður og 15 ára bóndasonur.

1 *Østen* er 56 ára óðalsbóndi í Sandavági.

236 menn í Vága sýslu 1801.

## *Eftirnøvn í Vága sýslu 1801*

1 eftirnavn er ikki tilskilað. Tað er 18 ára sonarkona Jógvans bónda í Bø, sum í manntalslistanum er skrivað Henrica Christiana.

7 *Abrahams-* eru 13 ára genta, sum tænir á løgmansgarðinum á Steig í Sandavági, og seks børn hins einnevnda Ábrahams í Gásadali.

2 *Anders-* eru tvær 37—82 ára konur í Sandavági.

5 *Andreas-* eru 38 ára kona í Miðvági, 13 ára arbeiðskona í Gásadali, 68 ára einkja og tvey børn í Seyrvági.

1 *Antonii*datter er 46 ára dóttir einnevnda Antonius í Seyrvági.
2 *Berents-* eru í Sandavági eins og hin einnevndi Berent.
1 *Bodils-* er 70 ára gamal drongur í Miðvági, men Bótal er ikki til sum fornavn í Vágum 1801.
2 *Christians-* eru 57 ára kona í Miðvági og 30 ára sonur Peder Christian Jacobsens í Sandavági, so møguliga er hetta eftirnavnið Peder Christiansen. Sí fornavnið Jacob Peder.
1 *Claus-* er 61 ára bóndakona í Seyrvági.
10 *Daniels-* eru í øllum sóknum eins og fornavnið D.
1 *Diurhuus* er gentunavn løgmanskonunnar á Steig í Sandavági.
1 *Egvans-* er 15 ára dóttir einnevnda Egvans í Seyrvági.
2 *Eidens-* eru 55 ára bóndi í Bø og 69 ára einkjumaður í Sandavági. Hesin seinni er helst faðir hins einnevnda E.
2 *Eriks-* eru døtur hins einnevnda E. í Mykinesi.
1 *Gregorius-* er dóttir hins einnevnda G. í Gásadali.
2 *Guttes-* eru 25 ára arbeiðskona í Sandavági og 16 ára sonur Gutta í Bø.
1 *Haaber* er 34 ára sóknarpresturin í Jansagerði í Miðvági.
1 *Haagens-* er 44 ára bóndakona í Miðvági, men Hákun er ikki til sum fornavn í Vágum 1801.
34 *Hans-* eru í øllum sóknum eins og fornavnið H.
13 *Haralds-* eru í øllum bygdum uttan í Seyrvági, og har er heldur ikki fornavnið H.
14 *Heines-* eru í øllum sóknum í Vágum, men ikki í Mykinesi, og har er heldur ikki Heina-fornavnið.
3 *Hendrichs-* eru 75 ára einkja í Miðvági og tvey einkjubørn í Mykinesi.
6 *Isaks-* eru bara í Seyrvági og í Mykinesi eins og fornavnið Í.
69 *Jacobs-* eru í øllum bygdum eins og fornavnið J.
13 *Jens-* eru í øllum sóknum uttan í Seyrvági, men har er fornavnið J.

4 *Jessers-* eru í somu bygdum sum fornavnið J., tó ikki í Miðvági.
34 *Johannes-* eru í øllum sóknum eins og fornavnið J.
60 *Johans-* eru í øllum bygdum og í øllum aldri.
23 *Johns-* eru somuleiðis í øllum bygdum og í øllum aldri.
3 *Jons-*. Í Miðvági eru tvey eftirnøvn stavsett ávikavist Jonsdatter og Jonssen, og somuleiðis hjá einum í Bø, men navn faðirs henda síðstnevnda er skilliga stavsett John.
5 *Lund* eru løgmaður Føroya og fýra børn hansara á Steigagarði í Sandavági.
3 *Magnus-* eru 82 ára gamalmenni og tvær 46—54 ára bóndakonur í Seyrvági, men sum fornavn er M. ikki til í Vágum 1801.
7 *Michels-* eru í øllum sóknum uttan í Seyrvági, og har finst heldur ikki fornavnið M.
22 *Niclas-* eru í øllum sóknum í Vágum, men ikki í Mykinesi, og har er tað heldur ikki sum fornavn.
40 *Oles-* eru í øllum bygdum eins og fornavnið.
6 *Peders-* eru í øllum sóknum í Vágum, men ikki í Mykinesi, og har er heldur ikki fornavnið P.
14 *Pouls-* eru í øllum sóknum í Vágum, men ikki í Mykinesi, og har er heldur ikki fornavnið P.
14 *Rasmus-* eru í øllum sóknum; eisini í Sandavági, har tað ikki er sum fornavn.
4 *Roberts-* eru børn hins einnevnda Roberts í Miðvági.
3 *Samuels-* eru tvær smágentur í Miðvági og ein 49 ára kona í Seyrvági.
8 *Simons-* eru eins og fornavnið í Miðvági og í Sandavági, og har aftrat er ein 90 ára einkja í Seyrvági við hesum eftirnavni.
1 *Sigvarts-* er 35 ára húskallur í Gásadali.
3 *Siverts-* eru 24 ára genta og 28 ára drongur í Mykinesi, og ein somuleiðis ógiftur 32 ára húskallur í Seyrvági.
8 *Svaboe* eru 59 ára einkja í Miðvági og 26 ára kona í Seyrvági. Hini eru øll í Kálvalíð í Miðvági: 50 ára

prestaeinkjan, tríggjar døtur hennara, 29, 23 og 15 ár, 31 ára sonur hennara og 2 ára sonarsonurin.

13 *Thomas-* eru øll í Miðvági og í Sandavági eins og fornavnið T.

1 *Thores-* er 52 ára húskallur í Bø. Tórður (Tórir?) er ikki til sum fornavn í Vágum 1801.

1 *Verdich* er 21 ára húshaldskona hjá presti í Jansagerði í Miðvági.

9 *Zacharias-* eru í øllum sóknum uttan í Seyrvági, og har er Z.-navnið heldur ikki sum fornavn.

1 *Østens-* er 17 ára dóttir hins einnevnda Ø. í Sandavági.

482 fólk í Vága sýslu 1801.

## 7. talva: *Kvinnunøvn í Vága sýslu 1801*

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Agatha | 2 | | | 3 | | 5 |
| Agnes | 1 | | | | 1 | 2 |
| Aleth | 1 | | | | | 1 |
| Anna | 13 | 9 | 5 | 5 | 11 | 43 |
| Anna Cathrine | 2 | | | 1 | 1 | 4 |
| Anna Elisabeth | 3 | | | | | 3 |
| Anna Lisbeth | 1 | 2 | | | | 3 |
| Anna Magreta | 2 | 2 | | | | 4 |
| Anna Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Annika | | 1 | | | | 1 |
| Barbara | 1 | 1 | | | | 2 |
| Bella | | | | | 1 | 1 |
| Birthe | | 1 | | | | 1 |
| Birthe Cathrine | | 1 | | | | 1 |
| Cathrine | 3 | 2 | 6 | 2 | 4 | 17 |
| Cathrine Marie | | | | 1 | | 1 |
| Dorthea | | 1 | | | | 1 |
| Dorthea Kristine | 1 | | | | | 1 |
| Elisabeth | 1 | | | | | 1 |
| Ellen Dorthea | | 1 | | | | 1 |
| Ellen Maria | | | | | 1 | 1 |
| Elsebeth | 5 | 4 | 5 | 3 | 4 | 21 |
| Elsebeth Johanne | | | | 1 | | 1 |
| Elsebeth Malene | 3 | | | | | 3 |
| Elsebeth Sophia | | | | | 1 | 1 |
| Elsebeth Susanne | | 1 | | | | 1 |
| Eva Magrete | | | 1 | | | 1 |
| Friderica | 1 | | 1 | | | 2 |
| Friderica Anna Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Friderica Cathrine | | 1 | | | | 1 |
| Friderica Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Henrica Christiana | | | | 1 | | 1 |
| Inger Magrete | | 1 | | | | 1 |
| at flyta | 43 | 28 | 18 | 17 | 24 | 130 |

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| flutt | 43 | 28 | 18 | 17 | 24 | 130 |
| Jette Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Juliane | | | | | 1 | 1 |
| Karen | 1 | | | | 1 | 2 |
| Kristine Cathrine | | | 1 | | | 1 |
| Lena | | 1 | | | | 1 |
| Lisbeth | 3 | 1 | 1 | | 2 | 7 |
| Malene | 5 | 4 | 4 | 2 | 1 | 16 |
| Malene Catrine | | 1 | | | | 1 |
| Maren | 2 | 7 | 4 | 3 | 1 | 17 |
| Maren Andrea | | 1 | | | | 1 |
| Maren Catrine | 1 | | | | | 1 |
| Maren Elisabeth | | 1 | | | | 1 |
| Maren Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Maren Susanna | | 1 | | | | 1 |
| Mari | | | | 2 | | 2 |
| Mariane | 1 | 1 | | | 1 | 3 |
| Marie | 2 | 1 | | | 3 | 6 |
| Marie Cathrine | | | | | 1 | 1 |
| Maria Susanna | 1 | | | | | 1 |
| Marine | | | 1 | | | 1 |
| Marthe Susanna | | 1 | | | | 1 |
| Rachel | | 2 | | | 1 | 3 |
| Rachel Marie | 1 | | | | | 1 |
| Ragnil | | | 1 | | | 1 |
| Sara | | | 1 | | | 1 |
| Sara Sophia | | 1 | 1 | 1 | | 3 |
| Sigga | 1 | 1 | 3 | | 1 | 6 |
| Sigga Cathrine | 2 | | | | | 2 |
| Sigga Malene | 1 | | | | | 1 |
| Sigri | 1 | | | | | 1 |
| Sophia | 1 | | | | | 1 |
| Sophia Magdalena | | | | 1 | | 1 |
| Sundeva | 5 | 3 | 3 | 1 | 4 | 16 |
| Susanna | 5 | 1 | 3 | 2 | | 11 |
| Susanna Cathrine | | 1 | | | | 1 |
| Tilsamans | 78 | 57 | 41 | 29 | 41 | 246 |

8. talva: *Mannanøvn í Vága sýslu 1801*

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Abraham | | | | 1 | | 1 |
| Andreas | | 1 | 1 | | | 2 |
| Antonius | | | 1 | | | 1 |
| Berent | | 1 | | | | 1 |
| Claus Peter | | 1 | | | | 1 |
| Daniel | 2 | 1 | 2 | 2 | 2 | 9 |
| Egvan | | | 1 | | | 1 |
| Eiden | | 1 | | | | 1 |
| Ellev | 1 | | | | | 1 |
| Erik | | | | | 1 | 1 |
| Gregorius | | | | 1 | | 1 |
| Gutte | | 1 | | 1 | | 2 |
| Hans | 8 | 3 | 4 | 2 | 2 | 19 |
| Hans Christopher | 1 | | | | | 1 |
| Hans Pauli | | | | 1 | | 1 |
| Hans Peder | | 1 | | | | 1 |
| Hans Samuel | 1 | | | | | 1 |
| Harald | 2 | 1 | | | 1 | 4 |
| Harald Jacob | | 1 | | | | 1 |
| Heine | 1 | 3 | 4 | 1 | | 9 |
| Hendrich | | 1 | | | | 1 |
| Isak | | | 1 | | 2 | 3 |
| Jacob | 9 | 4 | 5 | 7 | 6 | 31 |
| Jacob Peder | | 1 | | | | 1 |
| Jens | | | 1 | | 1 | 2 |
| Jens Pauli | | 1 | | | | 1 |
| Jesser | 1 | | 1 | | 2 | 4 |
| Johan | 9 | 7 | | 5 | 7 | 28 |
| Johan Michael | | 1 | | | | 1 |
| Johannes | 5 | 3 | 3 | 1 | 6 | 18 |
| John | 3 | 3 | 8 | 4 | | 18 |
| Jon | 1 | | | | | 1 |
| Michel | 1 | 1 | | 1 | | 3 |
| at flyta | 45 | 37 | 32 | 27 | 30 | 171 |

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| flutt | 45 | 37 | 32 | 27 | 30 | 171 |
| Niclas | 5 | 1 | 2 | | | 8 |
| Nicolai | | | 1 | | | 1 |
| Nils | | 1 | | | | 1 |
| Ole | 6 | 3 | 6 | 3 | 2 | 20 |
| Ole Jacob | | 1 | | | | 1 |
| Peder | 1 | | | 2 | | 3 |
| Peder Christian | | 2 | | | | 2 |
| Poul | | 3 | 1 | 1 | | 5 |
| Rasmus | 2 | | 3 | 3 | 1 | 9 |
| Robert | 1 | | | | | 1 |
| Samuel | 2 | | | | | 2 |
| Simon | 2 | 1 | | | | 3 |
| Sivert | | | | | 1 | 1 |
| Thomas | 3 | 1 | | | | 4 |
| Zacharias | | 2 | | 1 | | 3 |
| Østen | | 1 | | | | 1 |
| Tilsamans | 67 | 53 | 45 | 37 | 34 | 236 |

9. talva: *Eftirnøvn í Vága sýslu 1801*

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Abrahams- | | 1 | | 6 | | 7 |
| Anders- | | 2 | | | | 2 |
| Andreas- | 1 | | 3 | 1 | | 5 |
| Antonii- | | | 1 | | | 1 |
| Berents- | | 2 | | | | 2 |
| Bodils- | 1 | | | | | 1 |
| Christians- | 1 | 1 | | | | 2 |
| Claus- | | | 1 | | | 1 |
| Daniels- | 2 | 1 | 3 | 1 | 3 | 10 |
| Diurhuus | | 1 | | | | 1 |
| Egvans- | | | 1 | | | 1 |
| Eidens- | | 1 | | 1 | | 2 |
| Eriks- | | | | | 2 | 2 |
| Gregorius- | | | | 1 | | 1 |
| Guttes- | | 1 | | 1 | | 2 |
| Haaber | 1 | | | | | 1 |
| Haagens- | 1 | | | | | 1 |
| Hans- | 14 | 14 | 4 | 1 | 1 | 34 |
| Haralds- | 6 | 2 | | 2 | 3 | 13 |
| Heines- | 1 | 5 | 7 | 1 | | 14 |
| Hendrichs- | 1 | | | | 2 | 3 |
| Isaks- | | | 2 | | 4 | 6 |
| Jacobs- | 17 | 19 | 12 | 11 | 10 | 69 |
| Jens- | 5 | 1 | | 1 | 6 | 13 |
| Jessers- | | | 2 | | 2 | 4 |
| Johannes- | 6 | 4 | 8 | 4 | 12 | 34 |
| Johans- | 21 | 12 | 5 | 6 | 16 | 60 |
| Johns- | 4 | 4 | 9 | 5 | 1 | 23 |
| Jons- | 2 | | | 1 | | 3 |
| Lund | | 5 | | | | 5 |
| Magnus- | | | 3 | | | 3 |
| Michels- | 3 | 2 | | 1 | 1 | 7 |
| Niclas- | 14 | 2 | 4 | 2 | | 22 |
| at flyta | 101 | 80 | 65 | 46 | 63 | 355 |

| | Miðvágur | Sandavágur | Seyrvágur | Bøur og Gásadalur | Mykines | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| flutt | 101 | 80 | 65 | 46 | 63 | 355 |
| Oles- | 13 | 9 | 7 | 7 | 4 | 40 |
| Peders- | 1 | 1 | 1 | 3 | | 6 |
| Pouls- | 2 | 5 | 4 | 3 | | 14 |
| Rasmus- | 2 | 1 | 5 | 1 | 5 | 14 |
| Roberts- | 4 | | | | | 4 |
| Samuels- | 2 | | 1 | | | 3 |
| Simons- | 6 | 1 | 1 | | | 8 |
| Sigvarts- | | | | 1 | | 1 |
| Siverts- | | | 1 | | 2 | 3 |
| Svaboe | 7 | | 1 | | | 8 |
| Thomas- | 5 | 8 | | | | 13 |
| Thores- | | | | 1 | | 1 |
| Verdich | 1 | | | | | 1 |
| Zacharias- | 1 | 4 | | 3 | 1 | 9 |
| Østens- | | 1 | | | | 1 |
| ógreind | | | | 1 | | 1 |
| Tilsamans | 145 | 110 | 86 | 66 | 75 | 482 |